# Trivnaðarætlan

| Flokkur:<br>9.b | Næmingatal:<br>25 |
|---|---|
| Flokslærari:<br>Petur Lamhauge | |
| Toymi:<br>Petur, Annika og Jóhan M. | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Ólavur. |

**Røklaskipanin:**
Onga røklaskipan sum er. Tað er ikki neyðugt í løtuni, stovan er rein og ruddilig, og stutt er til kopimaskinu o.l., men tað skal sjálvandi eftirmetast og møguliga broytast seinri um neyðugt.

**Borðskipan:**
Hongur í skúlastovuni, soleiðis at næmingarnir vita nær teir skulu rudda av o.l.

**Ymisk tiltøk í flokkinum:**
SEV hevur bjóða okkum til Havnar 1/12-09. Annars verður foreldrafundur og hugnakvøld tann 17/9-09, har flokkurin fer at greiða frá um Íslandsferðina í mai 2009.

Oktober - vitjan á SEV
November - foreldraviðtalur
November - verkætlan
Mars - starvsvenjing
Mai - dagsútferð

**Serliga viðmerkingar um flokkin:**
Flokkurin er væl samansjóðaður og positivur.
Skúlating heima eru á firstclass.
Foreldur kunnu spyrja næmingin eftir koduni (dulmerki). Hetta hava vit avtala í flokkinum.

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Sámal Petur Petersen | Flokkur:<br>9. b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Kristni | | |
| Tímar:<br>2 tímar um vikuna | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Bíblia - bygnaður og innihald<br>Skapanin<br>Kirkjusøga - frá fyrstu hvítusunnu til nú | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>At næmingarnir koma at kenna Bíbliuna og tann týdning kristindómurin hevur í samfelaginum. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Upplestur, fyrilestur, bólkaarbeiði, framløgur, sangur. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Ymiskt kopiera tilfar<br>Bíblia<br>Sálmabók og aðrar sangbøkur<br>Vit arbeiða við Nýggja Testamenti 1 og 2<br>Internetið | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Dagliga við práti og uppgávum | | |
| Latin inn:<br>16. september 2009 | Undirskrift lærarans:<br>Sámal Petur Petersen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>Annika Djurhuus | Flokkur:<br>9.b | Skúlaár:<br>2009/2010 |
| Lærugrein:<br>Støddfrøði | | |
| Tímar:<br>5 tímar | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Vídd og rúmd<br>Brot og algebra<br>Geometri<br>Líkindi og hagfrøði | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Vídd og rúmd:<br>Endurtaka tað grudleggjandi at rokna víddir<br>At rokna vídd á ferningum<br>Rokna vídd á rætthyrningum<br>Rokna vídd á rætthyrntum skapum, sum til ber at býta sundur í rætthyrningar og ferningar<br>Rokna vídd á tríhyrningum<br>Rokna vídd á tilvildarligum fleirhyrningum<br>Rokna vídd á sirklum<br>Rokna vídd á skapum við einum skapi innií<br>Brúka formil til vídd at rokna longdir<br>Rokna við ymiskum eindum á longdum<br>Brot og algebra:<br>Brot<br>Lutfalsrokning<br>Potensar<br>Líkningar á øðrum stigi<br>Geometri:<br>Neyvtekna, tekningarnar skulu vera neyvar og vakrar, og hava fleiri loysnir<br>Nógv heiti eru í geometriini, vit venja heitini og at brúka orðabókina.<br>Einskapað og allíka skap<br>Líkindi og hagfrøði:<br>Vit endurtaka tað ið stendur í Skygni 8.<br>Eygbering<br>Hending<br>Tíðføri<br>Tíðføristalva<br>Bólkaðar eygberingar<br>Tídd<br>Tíddartalva<br>Pinamynd ella rimamynd | | |

| | |
|---|---|
| Arbeiðsháttur:<br>Uppgávur(problemstillinger) eru jú tað sentrala í støddfrøði.<br>Uppgávan hjá læraranum verður so í størstan mun at servera uppgávurnar soleiðis at hvør næmingur sjálvur kann tilogna sær sín egna rokniframferðarhátt. | |
| Tilfar og amboð:<br>Skygni 9<br>Avritsørk<br>Hugskot og uppg. úr øðum bokum og heimasíðum | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Støðuroynd fyri hvørt avsluttað evni<br>2 RM-royndir | |
| Latin inn:<br>4.sept | Undirskrift lærarans: |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Petur Lamhauge | Flokkur: 9. b | Skúlaár: 09/10 |
|---|---|---|

Lærugrein:
danskt

Tímar:
4 t um vikuna

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:

Er at betra um lesi-, skrivi- og taluførleikan í donskum.
Formligu reglurnar verður arbeitt við: rættskriving, bendingar, setningalæru og orðaflokkar verða viðgjørdir.
Teknseting verður eisini arbeitt við.

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Mál At gera næmingin føran fyri væl og virðiliga at skilja og duga at nýta danskt mál í skrift og talu. Næmingarnir skulu skriva átta stílar.
Næmingarnir skulu vera aktivir í undirvísingini og greiða frá á donskum.
At geva næmingin innlit í bókmentir og skaldskap í Danmark, samfelags- og mentanarviðurskifti í danska ríkinum.
At gera næmingin medvitandi um tann týdning, dansk mál hevur sum amboð til samskifti við onnur mál og aðra mentan.

Arbeiðsháttur:

Eg havi flokkin í 4 donsktímum um vikuna. Í styttri ella longri tíðarskeið viðgera vit eitt ávíst evnið, sum kemur fyri í grundbókini, eisini veður arbeitt í bólkum við støði í "Outsideren".
Fyrisøgn og skrivligar arbeiðsuppgávur verður brúkt umleið tveir tímar um vikuna. Lesing hinar tveir.
Næmingarnir læra at brúka mindmap og hugtøksskort sum amboð og teir skulu vera aktivir í undirvísingini og greiða frá á donskum. Átta stílar skulu skrivast og somuleiðis átta fyrisagnir.
Heimaarbeiði sæst á firstclass, sum allir næmingar hava atgongd til. Styttri tekstir at lesa og diktat heima.

Tilfar og amboð:
Undirvísingarmiðlar: "Dansk í niende" við tilhoyrandi uppgávum. Mállærubók "Ny skriftligt for niende". Ein skaldsøga verður viðgjørd: "Outsideren", Susan Hinton, og filmatisering av hesari skaldsøgu verður hugt eftir.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Meting og eftirmeting verða gjørd til stílar og fyrisagnir og støðumet tríggjar ferðir um árið.

| Latin inn: 14/9-09 | Undirskrift lærarans: Petur Lamhauge |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

<table>
<tr><td>Lærari:<br>Jóhan Mortensen</td><td>Flokkur:<br>9. b</td><td>Skúlaár:<br>09/10</td></tr>
<tr><td colspan="3">Lærugrein:<br>Enskt</td></tr>
<tr><td colspan="3">Tímar:<br>4</td></tr>
<tr><td colspan="3">Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Munligt enskt: Lesing av kendum og ókendum teksti.<br>Umseting av kendum teksti.<br>Samrøða í samband við kenda og ókenda tekstin.<br>Hoyriroyndir á enskum.<br>Skrivligt enskt: Umseting til enskt<br>At orða seg skrivliga á enskum<br>Ensk mállæra</td></tr>
<tr><td colspan="3">Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>At hvør einstakur næmingur kemur so langt fram á leið í tí omanfyri nevnda, sum tað nú einaferð ber til. At næmingarnir mennast í enskum og eru væl fyri í smb. við tær royndir, ið eru í 9. flokki.</td></tr>
<tr><td colspan="3">Arbeiðsháttur:<br>Vanliga verða tveir tímar nýttir til munligt enskt og tveir til tað skrivliga. Í tí munliga verður heimasetningurin tikin ígjøgnum í skúlanum. Næmingarnir skulu so lesa uppá við hús og verða hoyrdir í upplestri, umseting og práti á enskum. Av og á sleppa næmingarnir at royna seg í ókendum teksti og í hoyriroyndum. Í tí skrivliga verður umsett úr føroyskum/donskum til enskt og mállæruuppgávur verða tiknar ígjøgnum. Næmingarnir fáa bæði høvi til at arbeiða saman og við einstaklinga avriki at vísa, hvat teir duga. Skúlin er væl fyri á telduøkinum, og sjálvandi verða teldurnar eisini javnan brúktar í undirvísingini – bæði í munligum og skrivligum.</td></tr>
<tr><td colspan="3">Tilfar og amboð:<br>Munligt: New Choice fyri 9. flokk<br>Ókendur tekstur og hoyriroyndir (tilfar er tøkt á skúlanum)<br>Enskir sangir<br>Skrivligt: Osbornes<br>Ensk mállæra (Ása Hátún....) bæði mállæran og arbeiðsbókin<br>NB!!! Sum nevnt omanfyri, verður teldan eisini brúkt í undirvísingini.</td></tr>
<tr><td colspan="3">Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Tá eg nú javnan hoyri næmingarnar bæði í upplestri, umseting og samrøðu, má tað metast sum ein støðug eftirmeting av undirvísingini.<br>Í tí skrivliga verður eftirmett til terminsroyndirnar og fráfaringarroyndina. Næmingarnir lata eisini stílar inn eftir einari ávísari skipan. Tá arbeitt verður við mállæru inni á telduni, kann næmingurin alla tíðina eftirmeta seg sjálvan. Eg gangi eisini runt og snoddi meg fram til støðuna.</td></tr>
<tr><td>Latin inn:</td><td colspan="2">Undirskrift lærarans:<br>Jóhan Mortensen</td></tr>
</table>

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>Hans Poulsen | Flokkur:<br>9.b | Skúlaár:<br>09/10 |
| Lærugrein:<br>Søga/samtíð | | |
| Tímar:<br>2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>1) Ídnaðarkollveltingin<br>2) Ymiskar lærur í 19. øld<br>3) USA gerst heimsveldi<br>4) Fyrra heimskríggj<br>5) Nasisman hóttir friðin<br>6) Føroyar og Norðurlond<br>7) Fjølmiðlar<br>8) Kriminalitetur | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>At vekja og menna áhugan fyri lívi, virki og hugsan manna, so næmingarnir varnast tað, ið sermerkti farnar tíðir og kor teirra, sum tá livdu. At geva næmingunum eina hugmynd av tíðarvavi og tíðarhøpi. At viðgera samfelagsligar broytingar burturi og heima, soleiðis at næmingarnir betur skilja tað samfelag og tann heim, teir liva og virka í. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Vanlig floksundirvísing. Tað verður fortalt úr bókini, givið fyri at lesa heima. Roynt verður at fáa næmingarnar at luttaka í práti um tað, sum í bókini stendur.Lagt verður upp til næmingafyrilestur.<br>Ein søguligur filmur verður av og á. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Vit koma at lesa burturúr: Debes o.fl.: Heimssøga 2 og Petersen: Samfelagsfrøði 1<br>Eru onkur áhugaverd evni uppi í tíðini, verður steðgað við tey. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Royndarspurningar á jólum og á páskum | | |
| Latin inn:<br>11-09-2009 | Undirskrift lærarans:<br>Hans Poulsen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>Petur Lamhauge | Flokkur:<br>9. B | Skúlaár:<br>2009/10 |

Lærugrein:
lívfrøði

Tímar:
2 um vikuna

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:

Evnir sum verða viðgjørd:
Beinagrindin
Vøddarnir
Sunnheit og lísvstílur
Føðsluevnini
sodning
blóðrensl
konditión
immunverjan
Nøring
Alkohol, turvelvandi drøgg

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:

Mál við undirvísingini: Miða verður ímóti at næmingurin fær innlit í náttúruvísindaligan hugsunnar- og arbeiðshátt. Evnir sum viðgerast, eru um menniskja, og um hvussu mannakroppurin starvast. Somuleiðis hvussu mann á besta hátt kann verja hann ímóti skaðiligum evnum. Kynsbúning og nøring, hvussu mannaættin verður borin víðari, verður eisini viðgjørt.

Arbeiðsháttur:
Arbeiðshættir: Greitt verður frá um evnið lisið er heima. Samrøður í klassastovuni og laboratoriiarbeiði í D6. Rollupøl og fleiri testir, konditest, andadráttstest v.m.
Skrivligar arbeiðsuppgávur.

Tilfar og amboð:
Bøkur: Lívfrøði, Teodor Hansen. Ind i biologien eftir Arne Bjerrum.
Filmur: Supersice me.

| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Tá skrivligar uppgávur eru latnar inn. Próvtøl tríggjar ferðir um árið. | |
|---|---|
| Latin inn:<br>14/9 | Undirskrift lærarans:<br>Petur Lamhauge |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Hans Poulsen | Flokkur: 9.b | Skúlaár: 09/10 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Landalæra

Tímar:
2

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
1) Turkaland
2) Ghana
3) Heimsins orkukeldur
4) Korea
5) Belgia
6) Burðardygd
7) Australia
8) Føroya jarðfrøði

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Fyri øll lærugreinaøkini verður miðað móti,at næmingarnir skilja viðurskiftir, sum eru náttúrugivin og mannaskapt. Teir skulu gerast kunnigir við almenn landalæruhugtøk.

Arbeiðsháttur:
Vanlig floksundirvísing og bólkaarbeiði

Tilfar og amboð:
Vit lesa úr: Madsen og Døllner: Geografi 8 + uppgávubók.Rasmussen: Føroya jarðfrøði. Kort, myndir og filmar.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Fyri jól og fyri páskir verður skrivlig roynd.

| Latin inn: 11-09-2009 | Undirskrift lærarans: Hans Poulsen |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>ÓM | Flokkur:<br>9. b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Alisfrøði | | |
| Tímar:<br>2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Boligens opvarmning før og nu við arbeiðshefti<br>Magnetisme og menneskelig snilde við arbeiðshefti<br>Atomer og stråling | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Fyrst og fremst at læra allar næmingarnar um tey evni bøkurnar fara ígjøgnum og at vekja áhuga fyri lærugreinini. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Lærarin gjøgnumgongur tað nýggja saman við næmingunum. Ella øvut, tey gera fyrst royndir, og so taka vit tað teoretiska saman. Tosa saman um tað vit hava funnið útav, og annars um onkur av okkum veit okkurt, sum hann hevur lisið ella hoyrt, og sum hevur við evnið at gera.<br>N.B. Av royndum kann sigast, at torført verður at koma ígjøgnum alt, og um atom og geisling taka vit bara tað kravda. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Bøkurnar, talvan og tað sum er í alisfrøðistovuni. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmeting verður fyrst og fremst gjørd dagliga, men á ein serligan hátt við serligari roynd, hóskandi ferðir gjøgnum skúlaárið. | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans:<br>ÓM | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>Ásbjørn Berthelsen | Flokkur:<br>9 | Skúlaár:<br>2009/2010 |
| Lærugrein:<br>Tónleikur | | |
| Tímar:<br>2 tímar um vikuna | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Tónleikafatan<br>Nakað av práti og viðgerð av tónleiki, fyri at geva næmingunum eina djúpri fatan av tónleiki.<br><br>Tónleikamenning<br>Næmingarnir fáa møguleika at menna seg í sangi og spæli á ljóðføri. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br><br>Høvuðsmál: At geva næmingunum eina breiða fatan av hvat tónleikur er<br><br>Mítt mál fyri flokkin hetta árið er:<br>- at næmingarnir læra at kenna mun á ymsum tónleika stílum, við at lurta eftir nógvum tónleiki<br>- at næmingarnir læra at spæla nøkur ljóðføri – t.d. guittar, trummur, bass og klaver | | |
| Arbeiðsháttur: | | |
| Tilfar og amboð: | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu: | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans: | |

# Ársætlan fyri 9. Flokk í heimkunnleika 2008 - 2009

| DAGUR | | VIÐMERKINGAR |
|---|---|---|
| 18 - 19/8 | Morgunmat. Tosa um týdningin av at eta góðan (sunnan) morgunmat. | |
| 26 - 27/8 | Pitsasniglar. Kinakálsalati við ananas | |
| 1 -2/9 | Fiskafat við grønmeti og leysum rísi. Rabarbusúpan við tvebakkum. Tosa um týdningin av at eta fisk | |
| 8 - 9/9 | Kjøtsúpan við heimabakaðum flute | |
| 15 - 16/9 | Gratinerað burritos við icebergsalati( Likamsrøkt, kopi) | |
| 22 - 23/9 | Omelett við pylsum og salati. Mokkabitar í skuffu. Lesa um egg í bókini "Maturin" | |
| 29 - 30/9 | Pitabreyð við kjøti- og grønmetisfyllu. Lunkað súreplaterta við pískaðum róma | |
| 6 - 7/10 | Kanelhorn og kanelsniglar. Eftirmeting | |
| Heystfrí | | |
| 20 - 21/10 | Fesk súpan við smáum hveitidrýlum (tosa um slakt) | |
| 27 - 28/10 | Blóðpylsa í flísum á pannu við kókaðum eplum. (Frá køksbreytini) ella stokt livur. Pannukøkur | |
| 3 - 4/11 | Verkætlan | |
| 10 - 11/11 | Fiskafat við eplabátum. Jogurtfromasja | |
| 17 - 18/11 | Pitabreyð við skinku , salati og kilidressingi . Føðslulæra, grønmeti. | |
| Jólaroynd | | |
| 1 - 2/12 | Jólabaking. Jólaskuffukøka, finsk breyð og sirupskøkur | |
| 8 - 9/12 | Jóladøgurði. Pynta jólaborð.Stoktur hønsnarungi við eplabátum og sós. Mandlurís. | |
| 15 - 16/12 | Heimabakaðar holukøkur og gløgg | |
| Jólafrí | | |
| 5 -6/1 | Sunnur morgunmatur við ymiskum mjólkaúrdráttum. (Kálk) | |
| 12 - 13/1 | Stroganoff við heimagjørdum eplamorli | |
| 19- 20/1 | Fylt fransbreyðhorn. Flógv peruterta við súrróma | |
| 26 - 27/1 | Fiskasúpan við flúte. Appilsintrifflì. (Taka í aftur týdningin av at eta fisk) | |
| 2 - 3/2 | Mykinessalat. Frísk niðurskorin frukt. Vitaminur | |
| 9 - 10/2 | Ymiskir føstulávintsbollar | |
| 16. 17/2 | Fiskabollar í karrysós.Gularótasalat. Den du ved. | |
| 23 - 24/2 | Pastafat . Muffins | |
| Starvsvenjing | | |
| Starvsvenjing | | |
| 16 - 17/3 | Páskadøgurði. Hamburgarryggur við kókaðum grønmeti, eplum og sós. Bananasplitt | |

| | | |
|---|---|---|
| 23 - 24/3 | Páskaroynd. | |
| Páskafrí / | . | |
| 13 - 14/4 - | Kinesisk grýta við nudlum ogflættaðum frans breyði. | |
| 20 - 21/4 | Indonesisk súpan við høsnarungapettum (Filmur, Kost og godt + bóklingur til filmin) | |
| 27 – 28/4 | Ungarskt gullasj við eplamorli. Frukt | |
| 4 - 5/5 | Fiskafat við royktum fleski og rísi. Jarðberrond við makrónróma | |
| 11 – 12/5 | Kil ikon karn. Sesambollar og grøn salat | |
| Skr. próvtøka | | |
| 25– 26/5 | Farspannukøka við dampaðum grønmeti og eplum. Píska og frysta ís | |
| 1 - 2/6 | Pitsa við skinku og pepperoni . Grøn salat. Heimagjørdur ísur við frukt. Eftirmeting | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: | Flokkur: | Skúlaár: |
|---|---|---|
| Ingvard Lamhauge | 9.a/b | 2009 - 2010 |

Lærugrein:
Jarnsmíð/træsmíð

Tímar:
2 tímar/viku

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Sum nevnt, so eru næmingar bæði í jarnsmíð og træsmíð, og hava vit tí valt at gera lutir, ið bæði innihalda jarn og træ-arbeiði.
Fram til jólar gera vit ein grindaknív, ið hevur innfeldan jarnlut (hval) í skeftið,- umframt at hólkarnir skulu skapast og loddast.
Slíðrin verður skaptur úr leðri og seymaður saman.
Eftir jól verður trædreying á skránni.

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Fyri jarnsmíð, skulu næmingarnir læra at máta, saga, dongja, fíla og lodda
Træsmíð skulu teir læra um ymisku træsløgini, líma, samla og eftirviðgera.

Arbeiðsháttur:
Tá vit hava næmingar, ið bæði ynskja jarn og træsmíð, og fakhølini liggja saman, royna vit so vítt sum gjørligt,- at dekka ynskini hjá øllum næmingunum, og velja lutir, ið dekka bæði træ- og jarnsmíð

Tilfar og amboð:
Av tilfari, brúka vit meiri edlan við, og til metalarbeiði, brúka vit messing og silvur, ið verða viðgjørd og lodda.
Til at náa hesum, skulu næmingarnir brúka sag, rasp, fíl, sandpappír, lodditráð og olju at eftirviðgera við.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Eftirmett verður tá tingini eru liðug
Karakterir verða givnir til jólar, páskir og ársmet verður givið við ár enda.

| Latin inn: | Undirskrift lærarans: |
|---|---|
| 08. okt. 2009 | Ingvard |